Tjóðskjalasavnið

# Stutt og greitt um royndarkanning av skjalasavnsútgávum

Dátur og skjøl frá almennum fyrisitingarligum kt-skipanum, ið skulu varðveitast fyri eftirtíðina, skulu avhendast Tjóðskjalasavninum í eini skjalasavnsútgávu. Skjalasavnsútgávur skulu gerast eftir reglunum um *Kunngerð um kt-avhending av skjalasavnsútgávum til Tjóðskjalasavnið*. Í sambandi við móttøku nároynir Tjóðskjalasavnið allar skjalasavnsútgávur nágreiniliga fyri at tryggja, at dátur, bygnaður og skjalfesting er í samsvari við kunngerðina og ta ávísu avhendingarásetanina, ið er ásett um innihaldið av eini ávísari skipan.

Henda vegleiðingin er til myndugleikar og veitarar av kt-skipanum, sum gera eina ávísa framleiðslu og avhending av eini skjalasavnsútgávu til Tjóðskjalasavnið. Í vegleiðingini verður – í skema – greitt frá mannagongdini í sambandi við móttøku og royndarkanning fyri at gera skilligt hvat hendir, frá tí at tit avhenda eina skjalasavnsútgávu, til hon verður góðkend og goymd í goymsluskipanini hjá Tjóðskjalasavninum.

Í vegleiðingini verður m.a. svarað uppá:

- Hvussu er mannagongdin, tá Tjóðskjalasavnið tekur ímóti skjalasavnsútgávuni.
- Hvussu ein royndarkanning hjá Tjóðskjalasavninum gongur fyri seg.
- Hvussu long tíð gongur, áðrenn svar kann væntast.
- Hvat svar ein kann vænta.
- Hvat hendir, tá ein skjalasavnsútgáva verður góðkend.

Sum uppískoyti til hesa vegleiðing til royndarkanning av skjalasavnsútgávum í Tjóðskjalasavninum hava vit gjørt eitt yvirlit yvir vanligastu feilirnar, ið føra við sær, at skjalasavnsútgávur ikki kunnu góðkennast beinanvegin. Yvirlitið inniheldur eisini leiðbeining um, hvussu feilirnir kunnu rættast. Vit mæla til, at tit kanna henda listan nágreiniliga og rættar feilirnar, áðrenn tit avhenda eina skjalasavnsútgávu, - fyri at gera fyri royndarkanningina so einfalda og skjóta sum gjørligt.

| **Mannagongd í sambandi við móttøku** | **Hvat kann avhendandi myndugleikin/veitarin gera?** |
|---|---|
| Tjóðskjalasavnið kvittar fyri móttøkuna við einum telduposti, sum verður sendur til avhendandi myndugleikanum við einum avriti til møguligan veitara. Legg merki til, at samskiftið skal sendast til høvuðspost-adressuna, ikki til navngivnar persónar. | Gerið nýtslu av standardfylgiseðlinum, sum Tjóðskjalasavnið hevur gjørt – tað ger okkara arbeiði nógv lættari í mun til kvittanarskriv, skráseting o.a.<br><br>Fylgiseðilin kann heintast á okkara heimasíðu http://skjalasavn.fo/almenn-fyrisiting/kt-skipanir/avhending/ |
| Vit gera í fyrstu atløgu eina viruskanning. | Syrgið fyri, at antivirusforrit altíð eru dagførd. |
| Vit koyra eina sokallaða initialkanning, | Fremji sjálvi eitt endaligt eftirlit av |

| | |
|---|---|
| sum kannar eftir um “kontrolsummirnir”, ið eru givnir í fileIndex.xml í skjalasavns-útgávuni svara til kontrolsummirnar í teimum fílum, ið ganga inn í skjalasavns-útgávuna.<br>Um ósamsvar er, kunnu vit senda skjalasavnsútgávuna aftur til sendaran uttan nærri test og kanning.<br><br>Minnist til, at brøv og viðmerkingar, spurningar og svar til testverkstaðið hjá Tjóðskjalasavninum, skal sendast við telduposti. Pappírsbrøv mugu ikki leggjast við í eini avhending, og talgild brøv til testverkstaðið hjá Tjóðskjalasavninum mugu ikki liggja á avhendingarmiðlinum. | skjalasavnsútgávuni, áðrenn hon verður send.<br>Um so er, at broytingar eru farnar fram í onkrum av fílunum í skjalasavnsútgávuni í sambandi við ymiskar rættingar, er týdningarmikið, at tit minnist til at dagføra kontrolsummin á fílunum.<br><br>Um broytingar eru, kunnu tit møguliga brúka funkuna í testforritinum ADA, fyri at gera ein nýggjan fileindex.xml við nýggjum kontrolsummum. Havið tó í huga, at hetta kann taka langa tíð. Um so er, at broytingar skulu gerast, er tað – sum oftast skjótari bara at skifta teir kontrolsummir út, sum talan er um. |
| **Hvussu langa tíð tekur tað, áðrenn eitt svar kemur?** | |
| Tá initialkanningin er framd, fer skjalasavnsútgávan í eina bíðirøð, til tað er tíð til at testa og kanna hana. Vit testa skjalasavnsútgávur í tí raðfylgju, vit taka ímóti teimum. Hvussu langa tíð testin tekur, er eisini tengt at, hvussu stór skjalasavns-útgávan er, og hvussu torgreidd hon er. | |
| **Hvussu gongur kanningin fyri seg?** | |
| Ein av okkara starvsfólkum ger eina sokallaða “autotest”, t.e. eina kanning við royndarkoyringarforritinum ADA. Henda testin endar í einum sokallaðum “testlogs”, sum er grundarlagið fyri svarinum, sum kanningarstarvsfólkið sendir avhendandi myndugleikanum og møguliga eisini til veitaran av kt-skipanini. | Roynið sjálvi at gera eina ADA-testkanning og rættið í skjalasavnsútgávuni áðrenn avhending. Koyrið testina sum administrator, tí annars kann ADA geva misvísandi úrslit.<br><br>ADA kann takast niður frá heimasíðuni hjá Ríkisskjalasavninum. Sí her: [https://www.sa.dk/da/offentlig-forvaltning/it-leverandoerer/ada-testprogram-arkiveringsversioner/](https://www.sa.dk/da/offentlig-forvaltning/it-leverandoerer/ada-testprogram-arkiveringsversioner/)<br><br>Aflevering til arkivet – statslige myndigheder – ADA – Testprogram til arkiveringsversioner.<br><br>Leggið til merkis, at feilrættingar o.a. javnan verða gjørdar ADA. |

| | |
|---|---|
| | Tí er ikki vist, at tann versiónin av ADA, ið tit taka niður frá heimasíðuni, er sama útgáva, sum Tjóðskjalasavnið brúkar til at royndarkoyra skjalasavnsútgávuna við. |
| Eftir at ein "autotest" er gjørd, ger starvsfólkið, ið testar, eina "sjónbæra test", sum millum annað umfatar tey "tjekkpunkt", sum eru í fylgiskjalinum til hesa vegleiðing. | Farið ígjøgnum listan yvir vanligar feilir, og gerið tær neyðugu betringarnar og rættingarnar, áðrenn avhending til Tjóðskjalasavnið. |
| **Er testkanningin bert ein "syntaktisk" eftirmeting um kunngerðin verður fylgd?** | |
| Nei, testirnar verða gjørdar fyri at fáa eina yvirskipaða meting av, um umskiftið til skjalasavnsútgávuna hevur gingið væl. Vit kanna eisini fyri evni og vandamál, ið ikki neyðturviliga eru beinleiðis skeiv í mun til kunngerðina, men sum kortini gáast skal um.<br><br>Dømi: Óskrivaðar ella tómar síður, og óskrivað fyrsta síða. Tað er sjálvandi ikki ólógligt at hava óskrivaðar (heilt hvítar ella heilt svartar síður) í skjalasavnsútgávuni, men um so er, at tað eru nógvar, hevur tað kortini spurningar við sær, hvørt tað eru feilir, komnir í sambandi við framleiðslu av skjalasavnsútgávuni, ella um tað veruliga vísir innihaldið í hesi skipan.<br><br>Í sambandi við kanning við ADA-forritinum eru tað ymiskar testir, ið kunnu sláast til og frá. Nakrar av teimum ganga altíð inn í okkara test, nevniliga:<br><br>Fyri tabellir:<br>• Lyklatest (bæði primerlyklatest og fremmandalyklatest)<br><br>Fyri skjøl:<br>• Samantrýsting/Kompression<br>• Óskrivaðar fyrstu síður<br>• Óskrivað/tóm skjøl | Finnið útav – møguliga við hjálp frá ADA – um tað kunnu væntast spurningar viðv. ov nógvum blonkum skjølum, skjølum uttan samangreiping til mál o.s.fr., og kannið, hví hetta er so.<br><br>Tað er ein stórur fyrimunur, um tit skriva hesi vandamál í einum fylgibrævi ella – um so er, at tað er avtalað í avhendingarásetan-ini – í einum skjali í kontekstdokumenta-tiónini í skjalasavnsútgávuni. |

| | |
|---|---|
| Haraftrat kann starvsfólkið, ið testar, í ávísum førum hava tørv á at kanna, um tað finnast "privat tags" í tiff-fílum, eisini um har eru skjøl, ið eru sera stór í skjalasavnsútgávuni.<br>Hesar testir verða bert brúktar, um so er, at vit leita eftir frágreiðing um, hví so nógv óvanliga stór og rúgvumikil skjøl finnast. | |
| **Hvat er eitt aftursvar?** | |
| Eitt aftursvar er tað brævið, har Tjóðskjalasavnið fer ígjøgnum úrslitið av testini og sigur, hvat skal gerast um, soleiðis at skjalasavnsútgávan kann góðkennast.<br><br>Eitt aftursvar inniheldur:<br>• Lýsing av feilum, sum skulu rættast.<br>• Viðmerking um, hvørjar broytingar Tjóðskjalasavnið møguliga hevur gjørt í metadátum ella bygnaði í sambandi við testing. Í fyrsta umfari verða ongar rættingar gjørdar, men tað verður neyðugt í avmarkaðum føri at broyta heiti av einstøkum fílum, rætta skema-ávísingar ella rætta dátusløg o.s.fr.<br>• Ymiskar spurningar<br><br>Leggið til merkis, at eitt aftursvar ikki altíð er ein endaligur listi yvir allar feilir. Í ávísum førum eru tað bygnaðarligir trupulleikar í skjalasavnsútgávuni, sum skulu loysast, áðrenn ein verulig test kann gerast. Í øðrum førum er talan um trupulleikar, sum koma so ofta fyri, at aftursvarið bara vísir dømi um, hvat ið skal loysast.<br><br>Tað kann til dømis vera manglandi lýsingar av kolonnum ella tabellum, ella manglandi dokumentatión av kotuvirðum. | Lesið aftursvarið nágreiniliga og leggið merki, til hvørji umráði<br><br>• viðvíkja feilir, sum skulu rættast<br>• innihalda spurningar, ið skulu svarast<br>• innihalda upplýsing um møguligar broytingar í metadátum og o.t.<br><br>Setið tykkum í samband við Tjóðskjala-savnið um nakað er í aftursvarinum, ið tit ikki skilja ella nakað er, ið tit vilja hava nærri frágreiðing um. |
| **Hvat hendir í sambandi við eina góðkenning?** | |
| Tá ein skjalasavnsútgáva eftir Tjóðskjalasavnsins meting lýkur krøvini í | |

| | |
|---|---|
| kunngerðini, verður hon send víðari til okkara goymslu, har hon verður goymd í fleiri eintøkum á fleiri miðlum og á fleiri støðum í Føroyum.<br>Tá avhendingin til goymilagur er farin nøktandi fram, sendir Tjóðskjalasavnið eitt góðkenningarbræv til myndugleikan og møguliga veitaran.<br><br>Ikki fyrr enn góðkenningarbrævið er móttikið, kann myndugleikin strika tær dátur, sum eru umfataðar í skjalasavnsútgávuni. | |